## Gjørdu landgongd

Í Ný Sælandi eru 126 grindahvalir deyðir, eftir at teir gjørdu landgongd av sínum eintingum. Nýsælendsku fjølmiðlarnir skriva, at 105 hvalir vórðu funnir á einari strond á Farewell Split har norðuri á South Island. Tá fólk komu á staðið, vóru 39 av hvalunum framvegis á lívi, men tá tað ikki bar til at bjarga teimum, vórðu teir skotnir. Í Colville Bay á North Island gjørdu 63 grindahvalir landgongd. Tað eydnaðist at fáa 42 teirra útaftur á lívi, men hinir 21 doyðu, skriva nýsælendsku fjølmiðlarnir.



## Senda fólk heimaftur

Tað hevur vakt ans og elvt til øsing, at myndugleikarnir í Teilandi eru farnir undir at senda flóttafólk úr Laos heimaftur, hóast tey hava verið í Teilandi í fleiri ár. Reuters skrivar, at í nátt fóru 5.000 teilendskir hermenn undir at savna og flyta umleið 4.000 laotisk flóttafólk aftur til Laos, og at í morgun fóru teir fyrstu 16 lastbilarnir við umleið 400 flóttafólkum ímóti markinum. Mannarættindafelagsskapir stúra fyri, at flóttafólkini fáa eina ringa móttøku í Laos, tí tey eru av Hmong-fólkinum, sum hjálpti amerikanska herinum undir Vietnamkrígnum.



*- Tað tekur einar 2-3 minuttir at kroysta eitt vanligt akfar, sum kemur útaftur úr maskinuni sum ein lítil klumpur. Er talan um størri akfør, eitt nú bussar, hava vit ein stóran saks sum sker akførini sundur, og síðan verða tey kroyst í stykkjum, sigur Erhard Mortensen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

ikki høvdu teir stóru trupulleikarnar av rottum, men at tað meiri vóru fólk, sum koyrdu út í Havnardal, tá tað var vorðið friður, sum sóu rottur har úti.

Men sjálvandi sóu teir onkra rottu av og á.

Umstøðurnar í Havnardali kunnu ikki samanberast við nýggju umstøðurnar, ið arbeiðsmenninir fingu við nýggju brennistøðini á Sandvíkarhjalla.

- Munurin var serliga, at meiri skuldi gerast við hendrunum har úti umframt nógvi roykurin, ið stóðst av brenningini. Skuldi tú koma til hús uttan at lukta ov illa av royki, noyddist tú at goyma skiftiklæðini í einum plastikposa. Klæðini luktaðu altíð av royki, og eisini var tað nógv betri, tá vit komu niðan á Sandvíkarhjalla og sluppu undan øllum roykinum, tí her er brenningin filtrerað. Vit høvdu brúsurúm í Havnardali, men á Sandvíkarhjalla eru umstøðurnar so nógv betri, og alt er nógv reinari, sigur hann.

### Nógv fer burtur

Erhard Mortensen heldur, at Tinghúsið, sum selir endurnýtsluting og Sandvíkarhjalla, skuldi verið komið fyri nógvum árum síðan.

- Eitt slíkur møguleiki er ikki minst góður hjá fólki sum seta búgv og kanska ikki hava ráð til tey dýru tingini til íbúðina ella húsini.

Hann sigur, at tað er heilt ófatiligt, sum fólk koyra nógv burtur, og mangan hevur hann øtast, tá fólk komu við góðum og mest sum nýggjum tingum, ið tey ikki høvdu brúk fyri.

- Tú skuldi næstan trúð, at vit liva í einum miljónabýi og ikki í einum lítlum landi, soleiðis sum nógv fer burtur, og ofta eru tað vanlig fólk, sum koma við tingum, ið saktans kunnu brúkast av øðrum.

Erhard heldur soleiðis, at Tinghúsið er eitt sera gott høvi hjá fólki at keypa sær ymisk fyri lítið og lætt.

- Við móttøkuna hava vit bingju, sum vísir til endurnýtslu, og har koma fólk við nógvum, sum tey ikki brúka meiri. Eg haldi bara, at Tinghúsið skuldi verið uppaftur størri, leggur hann aftrat.

### Eftir 35 ár

Hóast hann fyllir sjeyti ár nýggjársaftan, er Erhard framvegis í starvi á brennistøðini, men tá tú ert farin um pensjónsaldur, fært tú bara eitt hálvt ár í senn – og noyðist at søkja um framhald.

- Mær hevur dámt hetta arbeiði heilt ótrúliga væl, og eg havi havt góðar starvsfelagar, bæði í Havnardali og á Sandvíkarhjalla. Hetta er so eisini ein orsøkin til, at árini eru vorðin so mong. Mítt arbeiði í dag er við jarnpressuna, har eg kroysti akfør og annað jarn, sum síðan verður stáplað upp og sent av landinum.

Hann sigur, at nú verður øll olja, bensin og allar veskur tappaðar úr akførum, áðrenn tey verða kroyst, eins og dekk og øll battaríir verða tikin úr vrakinum.

- Tað tekur einar 2-3 minuttir at kroysta eitt vanligt akfar, sum kemur útaftur úr maskinuni sum ein lítil klumpur. Er talan um størri akfør, eitt nú bussar, hava vit ein stóran saks sum sker akførini sundur, og síðan verða tey kroyst í stykkjum, sigur hann.

### Onnur ítrív

Men Erhard Jacobsen hevur ikki bara fingist við brenning í øll hesi ár. Hann hevur eisini havt onnur áhugamál, og í heili 24 ár arbeiddi hann soleiðis um kvøldarnar í Havnar Bio, har hann tók sær av eftirliti og annars syrgdi fyri, at fimlar, sum skuldu sendast til biografar úti um landið, fóru avstað. Filmarnir skuldu eisini avheintast, tá teir komu til landið, eins og teir skuldu sendast avstað aftur.

- Eg var blaðungur, tá eg byrjaði at arbeiða í Havnar Bio, og øll hesi ár sá eg næstan hvønn film, sum varð sýndur í biografinum. Vit stóðu jú eisini innanfyri hurðina og vístu fólki, sum komu heldur seint, á plássini, har tey skuldu sita. Soleiðis lærdi eg eisini at skilja enska málið betri, enn eg annars hevði gjørt, leggur hann aftrat.

Hann sigur, at eitt, sum var áhugavert við at arbeiða fyri Havnar Bio, var, at tú komst at kenna nógv fólk, sum gingu í biograf.

- Eg minnist soleiðis serliga væl, tá John F. Kennedy varð myrdur. Vit stóðu og prátaðu, Poul Müller, sum rak biografin, Kjartan Mohr og eg. Kjartan spurdi tá Poul, um hann ikki ætlaði sær at lukka biografin, tá forsetin fór til gravar – og so varð. Eingin biografur var í Havnar Bio hetta kvøld. So, sjálvt í Føroyum, vóru fólk sorgarbundin um morðið á John F. Kennedy, sigur Erhard, sum eisini starvaðist í Mimir í fleiri ár.

### Stuttleikasigling

Hóast Erhard ikki var leingi sjómaður á ungum árum, hevur hann í nógv ár havt stóran áhuga fyri bátum og bátasigling. Hann hevur soleiðis í fleiri ár havt stuttleikabát, sum hann eisini plagar at verða á floti í, tá líkindi eru, og høvið býðst.

- Eg havi ein góðan bát í dag, sum er 30 føtur langur og tríggjar metrar breiður. Báturin hevur nýggja maskinu, góð uppihalds-og sovirúm, eins og hentleikar eru til matgerð.

Erhard og Kirstin, sum hann býr saman við, hava soleiðis siglt kring oyggjarnar um sumrarnar, og tey hava eisini verið við á fleiri bátastevnum. Harumframt hava tey verið við á tveimum Noregsferðum, men tá var tað við øðrum báti enn hesum, sum Erhard hevur í dag.

Erhard er aktivur limur í Tórshavnar Bátafelag, og har hevur hann eisini sitið í nevnd.

- Nú eg fylli sjeyti, kundi eg næstu árini hugsað mær at brúkt meiri tíð í bátinum, men sum er, eri eg framvegis í starvi á brennistøðini, og tá er avmarkað, hvussu nógv avlopstíð er til bátin, sigur hann.

Erhard Mortensen er sonur Ethel og Eli Mortensen, sum vóru úr ávikavist úr Trongisvági og av Tvøroyri.

Hann eigur tveir brøður, Hans og Heðin Mortensen, sum er borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu.

Í sínari tíð fluttu foreldrini norður til Havnar at búgva og bygdu sær hús í høvuðsstaðnum.

31. desember millum klokkan 11 og 17 hevur Erhard Mortensen opið hús í Posthúskjallaranum í Tórsgøtu í Havn.